# ítróttur

Nr. 69 • fríggjadagur • 12. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi verður disko-eigari

**Tað er ikki endaliga váttað, men eftir øllum at døma kann Todi Jónsson í næstum skrivað diskotekseigari á navnaspjaldrið**

ANNAÐ ENN FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fremsti føroyski fótbóltsleikarin, Todi Jónsson, tykist nú vera í ferð við at leggja sær ætlanir um, hvat lívið skal innihalda, eftir at árini sum yrkisleikari eru av.

Og at hann er komin nakað væl út um tilrættisleggingina, tykist nú vera víst. Í øllum førum hava vit frá álítandi keldum frætt, at Todi Jónsson – saman við øðrum – nú er í ferð við at keypa eitt dansistað miðskeiðis í danska høvuðsstaðnum.

### Savningardepil

Her á blaðnum royndu vit í gjár at fáa fatur á Toda Jónsson, men hetta eydnaðist okkum ikki, tá FCK-leikararnir framvegis vóru til venjingar, tá blaðið fór til prentingar.

Men eru upplýsingarnar, sum blaðið hevur fingið, rættar, er lítið at ivast í, at mongu føroyingarnir, sum fara til Keypmannahavnar at hyggja at dystinum millum FCK og Brøndby, hava funnið sær eitt stað at savnast, og hesa ferð verður tað neyvan á Skarv. Sum skilst, eru tað bara smálutir, sum resta í, áðrenn avtalan um keypið verður almannakunngjørd, og tí er talan helst bert um heilt fáar vikur – ella møguliga dagar – áðrenn nýggja dansistaðið letur upp.

Sum sagt, so eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Toda, áðrenn evstamark okkara, men meira verður helst at frætta um málið í leygardagsblaðnum.



*Eftir øllum at døma kann Todi Jónsson í næstum eisini skriva diskotekseigari á navnaspjaldri*

# ÍSB verið í Íslandi

**Føroyingarnir stóðu seg framúr væl, tá borðtennislandsliðið hjá ÍSB um vikuskiftið tók lut í kappinigni um íslendska meistaraheitið**

BORÐTENNIS
*Tíðindaskriv*

Um vikuskiftið var føroyska landsliðið í borðtennis í Íslandi. Íslendskameistarakappingin var á skránni og fýrati leikarar vóru komnir til Reykjavíkar at dystast.

Á føroyska landsliðnum vóru Atli Skaalum úr Tórshavn, Jónsvein Petersen úr Vík og Jógvan Jákup Høj úr Tórshavn.



*Føroyska ferðaliðið, sum var í Íslandi um vikuskiftið. Hans J. Hansen, ferðaleiðari, Atli Skaalum, Jógvan Jákup Høj, Jónsvein Petersen og Petur Niclasen, venjari*

### Jónsvein og Atli vunnu heiðursmerki

Jónsvein Petersen og Atli Skaalum leiktu í bólkinum fyri rørslutarnað. Jónsvein leikti fimm dystir í einstaklingakappingini, hann vann fýra og tapti ein. Hann leikti sannførandi, men av tí at hann var gestaluttakari, slapp hann ikki at leika um heiðursmerkini.

Atli Skaalum kláraði seg eisini væl. Hann leikti fimm dystir í innleiðandi kappingini, hann vann tríggjar og tapti tveir. Ein teirra, ið Atli basti í einmansleiki, vann bronsumerki, tá ið avtornaði.

Kappingin í tvímansleiki var opin kapping, so her høvdu føroyingarnir møguleika at dystast um heiðursmerkini. Í kappingini fyri rørslutarnað vóru tveir innleiðandi bólkar. Seks lið vóru í hvørjum bólki. Atli og Jónsvein vunnu fýra dystir og taptu ein. Teir endaðu á øðrum plássi og skuldu tí dystast um bronsumerki. Dysturin um triðja plássið var javnur, men føroyingarnir megnaðu at vinna fimta settið.

### Jógvan Jákup smæddist ikki burtur.

Yngsti maðurin á føroyska ferðaliðnum var Jógvan Jákup Høj úr Havn. Jógvan Jákup var í bólkinum fyri menningartarnað. Jógvan Jákup kom illa frá byrjan og tapti tveir teir fyrstu dystirnar tepurt. Men so kom ferð á, og hann vann tríggjar teir næstu dystirnar. Hann fekk sostatt seks stig og endaði á øðrum plássi í innleiðandi kappingini. Men av tí at hann var gestaluttakari, so slapp hann ikki í finalubólkin.

### Skemman stuðlaði føroysku luttøkuni.

Íslendingar eru góðir borðtennisleikarar. Teir hava í nøkur ár verið á altjóða pallinum og hava fingið góð úrslit í bæði EM- og HM - kappingum. Fremsti borðtennisleikarin í Íslandi í løtuni var við í kappingini. Hesin situr í koyristóli, og er sitaður nummar 17 á altjóða styrkislistanum.

Jákup á Duul Jacobsen og Skemman eru høvuðsstuðlar hjá Ítróttasambandi Fatlaðra í Íslandi. Og tá ið íslendingar buðu føroyingum til meistarakappingina, so boðaði Skemman á Hálsi frá, og segði, at teir vildu stuðla føroyska tiltakinum.



# Tað styttist og styttist millum FCK og Brøndby

**Útisigurin hjá FCK og javnleikurin á heimavølli hjá Brøndby hava við sær, at spenningurin framvegis er stórur um, hvør fer at vinna DM**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*FCK vann tepurt í FCM, meðan Brøndby óvæntað misi stig móti AGF, so nú eru bert fimm stig ímillum oddaliðið, og enn eigur FCK heimadyst móti Brøndby til góðar*

Áhugin fyri fótbóltsferðini hjá Sosialinum og Atlantic Airways sigst vera stórur. Mikukvøldið var 26. umfarið av donsku superliguni á skránni, og tað er ikki undur í, um áhugin millum fótbólts spentar føroyingar verður uppaftur størri fyri at vera hjástaddir, tá Brøndby í næstsíðsta umfarinum av donsku landskappingini í ár fer at vitja FCK.

Tá tað fyri einum stórum mánað síðani varð farið undir seinnapartin av hesum kappingarárinum, var munurin frá Brøndby á fremsta plássinum og niður til meistararnar í FCK á næstfremsta plássinum tólv stig. Eingin tóktist rokna við møguleikanum, at FCK skuldi megna at fáa Brøndby aftur. Og spælararnir hjá FCK hava aftur og aftur verið í fjølmiðlunum og sagt, at teir hava langt síðani givið skarvin yvir.

Men munurin upp til Brøndby er minkaður og minkaður. Mikukvøldið vórðu aftur tvey stig telgd av. Nú er Brøndby fimm stig frammanfyri FCK, og tá havt verður í huga, hvussu tað hevur hilnast hjá FCK og Brøndby síðstu vikurnar, so er tað als ikki óhugsandi, at FCK við sigri á Brødby í 32. umfarinum, sum verður spælt sunnudagin 12. mai – tað er tá, at nógvir føroyingar ætla sær at vera í Parkini – fer at leggja seg framum liðið, sum hevur verið á odda alla tíðina, síðani teir fyri ólavsøku í fjør fóru undir hetta kappingarárið.

Sjey umfør eru eftir at spæla. FCK skal spæla soleiðis: Lyngby (ú), Silkeborg (h), Esbjerg (ú), Vejle (h), AGF (ú), Brøndby (h) og AaB (ú). Brøndby eigur hesar dystirnar á: FCM (h), AaB (ú), AB (h), Viborg (ú), OB (h), FCK (ú) og Lyngby (h).

### Christian Høgni snýttur

Vejle varð ikki roknað at hava nógvar møguleikar fyri at fáa stig, tá teir mikukvøldið fóru norður til Aalborg. Men úrslitið var 2–2, og tað hevði einki forgjørt verið í tí, um Vejle vann við einum máli, og at Christian Høgni Jacobsen hevði verið tann, sum hevði havt skorað avgerandi málið.

Christian Høgni varð skiftur inn, tá 2. hálvleikur var 20 minuttir gamal. Hann var væl upplagdur. Ta einu ferðina sneiddi hann fleiri mótstøðumenn av sær. Hann kom so at siga leysur mitt fyri og heilt stutt úr málinum. Men ólukkutíð varð hann taklaður akkurát, tá hann skuldi stýra bóltinum síðsta pettið. Á sjónvarpsskýggjanum sá tað soleiðis út, sum um verjuspælarin hjá AaB togaði Christian Høgna niður, men dómarin segði einki.

Í AaB vóru teir vónsviknir av, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna. Men Mikkel Beck kundi gleða seg um, at tað eydnaðist honum at skora á heimavølli. Hetta vóru fyrstu málini hjá honum á heimavølli, síðani hann kom úr útlegdini í Fraklandi, og so skoraði hann tvær ferðir – fyrst upp á brotsspark, sum varð framt ímóti honum, og so við góðum stútara eftir innlegg.

### Todi tætt við

FCK hevði ongantíð havt vunnið á útivølli ímóti FCM, tá teir mikudagin settu kós ímóti Ikast. Eingin ivi er í danska fótbóltsheiminum um, at í løtuni er FCK tað liðið, sum vísir mest sannførandi avrikini í superliguni. Tølini boða eisini frá hesum. Í sjey teimum seinastu umførunum hava teir í FCK ognað sær seytjan stig.

FCK menninir høvdu gott tak á heimaliðnum mesta partin av tíðini, men tað gekk rúm tíð, áðrenn teir skoraðu einasta málið.

Fyrstu løtuna var fleiri ferðir tætt við. Todi Jónsson stútaði í 11. minutti dygst omanfyri, og hann var onkra aðra ferðina í góðari støðu at gera mál. Men tá var Zuma ov sjálvsøkin.

Sigursmálið stútaði Carsten Fredgaard í 62. minutti, eftir at innlegg var komið úr høgru. Tá tólv minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki kom Peter Møller á vøllin fyri Toda Jónsson, sum framvegis einki hevur ímóti, at hann viðhvørt sleppur at hvíla seg.

### Brøndby kiksaði

Oddaliðið úr Brøndby var stórfavorittur á heimavølli ímóti AGF, sum er undir niðurflytingarstrikuni. Málverjin hjá Brøndby, Mogens Krogh, bleiv skaddur undir upphitingini, og so fór ein ikki serliga stórur unglingi í málið. Tað órógvaði, og nýggi maðurin millum stólparnar átti sín lut í ótrygga verjuspælinum.

AGF spældi væl, og teir komu á odda 1–0 í 7. og 2–0 í 21. minutti. Brøndby minkaði um munin beinanvegin í 2. hálvleiki, og so varð roknað við, at teir skuldu megna at vinna. Men tað var ikki fyrrenn í yvirtíðini, at teir megnaðu at fáa málið, sum bar við sær, at teir fingu eitt stig.

At teir í Brøndby kendu seg rættuliga kroystar sást aftur í, at teir í 2. hálvleiki fingu trý gul kort, meðan mótstøðumenninir á AGF liðnum, sum er niðanfyri niðurflytingar strikuna, men sum avgjørt ikki spældi sum nakað botnlið, einki kort sóu.

Lyngby legði hesa ferð rygg til 4–0 tap á útivølli ímóti OB. Kasper Dalgass, sum hevur møguleika at sleppa á HM liðið hjá Morten Olsen, skoraði trý mál, og gjørdist harvið nýggjur maður á ovasta skjúttaratindinum. Viborg vann 3–2 á heimavølli ímóti Silkeborg, sum framvegis er í tungum sjógvi – sjálvt um framgongdin hevur verið stór, síðani Morten Bruun gjørdist venjari. Tað bleiv hann, tá Benny Johansen fekk sekkin. Hesin Benny er tann, sum samráddist við FSF um landsliðsstarvið. Tað er altso tann Benny, sum býr í Keypmannahavn og ikki í Silkeborg – forstås!

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby | 26 | 16 | - | 7 | - | 3 | 58 | 22 | 36 | 55 |
| 2 FCK (M) | 26 | 14 | - | 8 | - | 4 | 45 | 18 | 27 | 50 |
| 3 AaB | 26 | 14 | - | 5 | - | 7 | 43 | 33 | 10 | 47 |
| 4 OB | 26 | 11 | - | 8 | - | 7 | 41 | 37 | 4 | 41 |
| 5 AB | 26 | 9 | - | 11 | - | 6 | 37 | 26 | 11 | 38 |
| 6 Esbjerg | 26 | 11 | - | 5 | - | 10 | 36 | 35 | 1 | 38 |
| 7 FCM | 26 | 9 | - | 9 | - | 8 | 31 | 23 | 8 | 36 |
| 8 Viborg | 26 | 8 | - | 10 | - | 8 | 34 | 32 | 2 | 34 |
| 9 Silkeborg | 26 | 6 | - | 6 | - | 14 | 29 | 36 | -7 | 24 |
| 10 Vejle | 26 | 5 | - | 8 | - | 13 | 31 | 58 | -27 | 23 |
| 11 AGF | 26 | 4 | - | 9 | - | 13 | 30 | 43 | -13 | 21 |
| 12 Lyngby | 26 | 2 | - | 8 | - | 16 | 21 | 73 | -52 | 14 |

**Føroyskir leikarar:** Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

# Enn eitt tap

Julian Johnsson var ikki á vøllinum, tá Hull City enn eina ferð var við undirlutan í ensku 3. deildini týsdagin.

Roknað varð annars við, at føroyski miðvallarin fór at verða tøkur, men skaðin, sum hevur argað seinastu vikuna, sýntist tó somikið treiskur, at Julian kortini ikki fekk spælt.

Sum sagt, so gjørdist talan um enn eitt tap hjá Hull. Hesa ferð var mótstøðuliðið Rochdale, og tó at Hull tvær ferðir var frammanfyri, so eydnaðist heimaliðnum at enda at vinna dystin 3-2.

**-jm**